# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 26. mars 2010




Mynd: Álvur Haraldsen

## Rás 2 sigur frá

Í morgin klokkan 15.00 byrjar Rás 2 at senda í sambandi við avgerandi FM-finaludystin hjá monnum í flogbólti, sum verður millum SÍ og Mjølnir. Og tá dysturin fer í gongd, fara Hilmar Jan Hansen og Hans Fróði Jensen at fylgja við dystinum frá byrjan til enda. Aftaná verða sjálvandi samrøður og beinleiðis sending frá steypa- og heiðursmerkjahandanini á Giljanesi.

# Endabresturin á Giljanesi

**Seinnapartin í morgin fellur avgerðin í kappingini um føroyameistaraheitið í mansflogbólti, tá SÍ og Mjølnir spæla triðju og avgerandi finaluna á Giljanesi**



eindstirr@kallnet.fo

Hilmar Jan Hansen

Nú er bara ein kjansur eftir, og seinnapartin í morgin stendur vinnarin eftir við øllum. So einfalt er tað, tá SÍ og Mjølnir í morgin klokkan 15.30 fara á vøllin í ítróttarhøllini í Giljanesi at spæla triðju og altavgerandi finaluna um føroyameistaraheitið í Eik-liguni hjá monnum.

Fyrru finalurnar vóru á Eiði fyri viku síðani, og tá vann SÍ leygardagin og Mjølnir sunnudagin. Í báðum førum var talan um fimmsettarar, so alt bendir á ein javnan og spennandi dyst, nú avgerðin skal falla.

### Væl fyrireikaðir

– Vit hava vant á Giljanesi alla vikuna, so vit eru væl fyrireikaðir. Nú tað gjørdust trýggir dystir, eru vit sjálvandi sera fegnir um, at vit vunnu síðsta dystin í landskappingini, so vit ikki skuldu til Klaksvíkar at spæla henda dystin. Gamaní, plaga vit at spæla í Sørvági, men vit trívast eisini á Giljanesi, sum verður okkara heimavøllur í morgin, sigur spælandi venjarin hjá sørvingum, Ragnar í Haraldsstovu.

– Eg haldi, at vit síggja ljóst upp á tað, og menn tykjast sera uppsettir. Vit ætlaðu at avgera tað við tveimum dystum, men nú skulu vit so vísa, at vit í øllum førum eru førir fyri at gera tað í triðja dystinum í staðin. Helst fara vit at spæla nøkulunda upp á sama máta, sum vit gjørdu á Eiði, men sjálvandi verða onkrar justeringar.

### Avgerandi formur

Ein av spælarunum hjá Mjølnir er Eyðstein Elttør, sum spælir libero, og hann væntar, at avgerandi fyri úrslitið í dystinum í morgin verður, hvat av liðunum megnar at vísa besta dagsformin.

– Liðini kennast so væl og hava spælt so nógvar dystir ímóti hvørjumøðrum, at tað snøgt sagt snýr seg um, hvør er betur fyri júst nú. Hjá okkum hava venjingar verið trý kvøld í hesi vikuni, og í kvøld verður tað meira tað taktiska, sum skal fínpussast, og kanska verður hugt at onkrum upptøkum, sigur Eyðstein Elttør.

– Men eru øgiliga spentir, tí hetta er ein hin størsti dysturin, sum kann spælast. Vinnarin verður føroyameistari og størri fær tað ikki verið. Og so vóna vit sjálvandi, at nógv fólk kemur vestur við okkum, tí tá vit spældu á Eiði, valdu mong heldur at lurta eftir tykkum, ið varpaðu út. Men nú vóna vit, at tey koma við í staðin, so vit kunnu fáa allan tann stuðul, vit hava brúk fyri.

## Dystir um vikuskiftið

### Flogbóltur

**Triðja FM-finala, menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 27/03 | 15.30 | SÍ-Mjølnir | Giljanes |

### Fótbóltur

**Løgmanssteypið**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 27/03 | 13.00 | FC Hoyvík-TB | Jóhan Petur Michelsen |
| 27/03 | 14.00 | ÍF-Undrið | Alex Troleis |
| 27/03 | 14.00 | FC Suðuroy-Skála | Lars Müller |
| 27/03 | 15.00 | HB-B36 | Petur Reinert |
| 27/03 | 15.00 | B71-Víkingur | Eiler Rasmussen |
| 27/03 | 15.00 | EB/Streymur-NSÍ | Páll Augustinussen |
| 27/03 | 15.00 | B68-07 Vestur | Dagfinn Olsen |
| 27/03 | 17.00 | AB-KÍ | Ransin Djurhuus |

# Nú rúka tey stóru

**Í morgin verða átta dystir í kappingini um Løgmanssteypið, og longu frammanundan kann sigast, at onkur av teimum stóru steypaliðunum rúka út**



eindstirr@kallnet.fo

Hilmar Jan Hansen

Fyrsta umfar í steypakappingini hjá monnum er í morgin, og flestu eygu munnu vera vend ímóti dystunum millum nøkur av størru feløgunum, sum bresta saman. Soleiðis er greitt, at bara annaðhvørt HB ella B36 koma víðari, eins og bara EB/Streymur ella NSÍ, sum møtast í Streymnesi, gera tað. Eisini sleppa uppflytararnir úr B71 at royna seg ímóti steypavinnarunum frá í fjør, Víkingi.

Tey, sum búgva í høvuðsstaðnum og hava saknað fótbóltin illa í vetur, kunnu fara til ikki færri enn tríggjar dystir, tí teir eru lagdir soleiðis, at tað ber til at fara til tann fyrsta longu klokkan 13 og so halda fram, til tann síðsti er liðugur fram ímóti klokkan 19.

Ein fjórði dystur skuldi eisini verið í Havn, har Undrið upprunaliga hevði heimavøll ímóti ÍF, men tey bæði feløgini hava býtt um, so spælt verður í Fuglafirði í staðin. Hetta er annars ein av teimum dystunum, har annað liðið er stórfavorittur, og tann leikluturin hjá ÍF minkar væl ikki, nú liðið eisini fekk heimavøll.

Somuleiðis má FC Suðuroy metast sum favorittur ímóti Skála. Tað er B68 vælsaktans eisini ímóti 07 Vestur, ið flutti niður í fjør, og AB á sama hátt ímóti hinum niðurflytaranum frá í fjør, KÍ.

Ein av dystunum, ið hinvegin kann vera ein forpremiera til toppdyst í næstbestu deildini, er tann millum FC Hoyvík og TB, sum eru tvey av fýra feløgum, sum kunnu flyta upp við kappingarlok, tí ikki færri enn seks av 10 liðum í 1. deild eru eykalið hjá Vodefone-feløgum.

Teir átta vinnararnir í steypadystunum í morgin koma víðari í fjórðingsfinalurnar, og tá verður aftur lutakast um, hvussu liðini møtast.